Julian setti hol á

Føroyski miðvallarin var fyrstu ferð málskjútti í landskappingardysti fyri ÍA, tá ið hann stutt undan steðginum við høvdinum skoraði

ÍSLAND
Jóannes Hansen

Fyri fyrstu ferð, síðani hann kom til Akranesar, var Julian Johnsson mikukvøldið málskjútti í landskappingardysti. ÍA vitjaði í Keflavík, og tað eydnaðist teimum at vinna 2-0. Fyrra málið fingu teir fýra minuttir undan steðginum. Sum so ofta í Íslandi, so var í báðum førunum, tá ið ÍA skoraði, talan um deyðbóltsstøðu. Fríspark varð sent av miðjuni og fram í brotsteigin, og Julian var hægstur og stútaði í kassan.

Miðskeiðis í 2. hálvleiki økti ÍA, tá ið Keflavík gjørdi sjálvmál. Eftir horna boksaði málverjin í ein av sínum viðspælarum, og so fór bólturin í málið.

ÍA er á triðja plássi við sama stigatali sum FH, ið er næstfremst. Hóast tað eru fimm stig fram til Fylkir, so er Julian Johnsson væl nøgdur.

- Øll liðini taka stig frá øllum, og vit eiga báðar dystirnir eftir ímóti Fylkir. Ætlanin hjá íA var at vera við í toppinum, og tað eru vit. Úrslitini á útivølli hava verið heilt góð. Trupulleikin hevur verið, at vit hava mist ov nógv stig á heimavølli, sigur Julian Johnsson, sum er fastur maður á miðvøllinum.

Mikukvøldið vann Víkingur 3-2 á ÍBV. Hetta var fyrsti sigurin hjá botnliðnum, sum nú er eitt stig aftanfyri Fram, ið hevur Fróða Benjaminsen og Hans Fróða Hansen á liðnum. KA, sum er fjórði aftast, tapti 2-0 á heimavølli ímóti oddaliðnum, Fylkir.

Hóast Fram er næstaftast, so heldur Julian ikki, at tað kann sigast, at tað stendur heilt illa til hjá Fróða, Hans Fróða og teimum.

- Tað er so mikið tætt, at trý stig í einum dysti hevði lyft teimum fram á sjeynda og næstan sætta plássið. Um eini fýra umfør fæst at síggja, hvør fer at hanga eftir í botninum, heldur Julian.

Albert Sævarsson og Grindavík taptu mikukvøldið 4-1 í Hafnafirði. Grindavík er triði aftast.

Í næsta umfarinum verður spælt soleiðis: 27. juni KA-KR, 28. juni Fram-FH og Grindavík-Keflavík og 29. juni spæla Fylkir-ÍBV og ÍA-Víkingur.

Fyri fyrstu ferð í íslendskum landskappingardysti kom Julian Johnsson á máltalvuna, tá hann stútaði ÍA framum í dystinum móti Keflavík

1. deild menn

		d	v	j	t	mál	mál	+/-	stig
1	Skála	8	5	2	1	18	7	11	17
2	HB	8	5	2	1	21	9	12	17
3	NSÍ	8	4	3	1	14	10	4	15
4	VB	8	3	4	1	11	6	5	13
5	B36	8	3	3	2	17	12	5	12
6	EB/Streymur	8	3	2	3	14	11	3	11
7	KÍ	8	1	6	1	9	10	-1	9
8	GÍ	8	2	2	4	9	17	-8	8
9	ÍF	8	1	1	6	1	2	26	-14
10	B68	8	0	1	7	6	23	-17	1

Íslendska Landsbankadeildin

		d	v	j	t	mál	mál	+/-	stig
1	Fylkir	7	5	2	0	11	3	8	17
2	FH	7	3	3	1	11	7	4	12
3	ÍA	7	3	3	1	9	5	4	12
4	KR	7	3	2	2	9	7	2	11
5	Keflavík	7	3	1	3	7	11	-4	10
6	ÍBV	7	2	3	2	12	9	3	9
7	KA	7	2	1	4	5	8	-3	7
8	Grindavík	7	1	4	2	6	10	-4	7
9	Fram	7	1	2	4	7	11	-4	5
10	Víkingur R	7	1	1	5	6	12	-6	4

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)

Nú skal Skála standa sína roynd

NSÍ var fyrsta liðið, sum koppaði oddaliðnum, og nú hevur NSÍ mikukvøldið møguleika við sigri á HB í Gundadali at blanda seg orduliga upp í oddastríðið

8. UMFAR SAMANUM
Jóannes Hansen

Í góðveðrinum mikukvøldið var síðsti dysturin í næstsíðsta umfarinum undan summarsteðginum. NSÍ vann 2-0 á heimavølli ímóti Skála. Harvið hava øll liðini tapt í hvussu so er eina ferð. Skála er framvegis oddalið. Teir hava sama stigatal sum HB, men teir varðveita oddasessin, tí teir vunnu innanhýsis uppgerðina.

Bæði fyri Skála og HB verða næstu dagarnir rættuliga áhugaverdir og avgerandi fyri, hvussu støðutalvan fer at síggja út í summarsteðginum. Skála skal sunnudagin spæla á heimavølli ímóti EB/Streymi. Tá fæst fyrsta ábendingin um, um fyrsta tapið í landskappingini hevur havt nakran skaða við sær. Skála venjarin, Johan Nielsen, minnist væl, hvussu tað gekk hjá GÍ, tá ið teir fyri nøkrum árum síðani kollsigldu eftir fyrsta tapið, eftir at teir høvdu vunnið allar dystirnar í fyrru leikhálvu.

Við sigrinum á Skála fekk NSÍ orduliga um endan. NSÍ er á aldukambinum, eftir at teir burturúr seks teimum seinastu umførunum hava fingið sekstan stig. Hvussu væl tað veit við hjá NSÍ fer at verða staðfest í Gundadali mikukvøldið. Orsaka av Intertoto Cup uppgerðini hjá NSÍ ímóti Esbjerg í morgin er landskappingardysturin í 9. umfari millum HB og NSÍ ikki á skránni fyrrenn mikukvøldið. Tá fara nummar tvey og trý at spæla, og tá fer møguligur NSÍ sigur at bera við sær, at teir kunnu lyfta sær upp um HB.

Um gongdin í seinnu leikhálvu fer at verða tann sama, sum hon hevur verið higartil í ár, so verður talan um rættuligt finaluumfar, tá ið 18. og síðsti leikdagurin upprennur 2. oktober. Tá skulu NSÍ og HB spæla í Runavík, har HB tryggjaði sær meistaraheitið fyri tveimum árum síðani, og tá skal Skála spæla torføran útidysti á Eiði.

Umframt Skála, HB og NSÍ eru tað VB og kanska B36, sum liggja væl fyri. Higartil hevur B36 verið stóra spurnartekini. Mánakvøldið skulu teir spæla á Svangaskarði, og VB skal á Jóansøku leygarkvøldið spæla á Vágseiði ímóti GÍ.

GÍ og B68 eru tvey av fýra feløgum, sum tað hevur hilnast stak illa hjá. Hini bæði eru ÍF og KÍ. Hesi bæði hittast í Fuglafirði sunnudagin.

Sum tað áður hevur verið nevnt í hesum teigi, so er kappingin hjá heimligu fótbóltsliðunum ógvuslig í hesum døgum. Tað er órímuligt at sammeta leikliga avrikið á føroysku graslíkisvallunum við tað, sum er at síggja í sjónvarpinum úr Portugal. Men spenningurin er ikki minni í Føroyum.

Í næstu viku fara flestu fótbóltsliðini í summarfrí. VB, HB, ÍF og NSÍ mugu bíða inntil annan sunnudag, tá tey skulu spæla seinnu hálvfinaluna í steypakappingini.

Hjá teimum, ið eru best fyri, ræður um at varðveita góðu gongdina eftir summarfrítíðina. Hjá teimum, sum tað hevur hilnast minni væl hjá, fer steðgurin ivaleyst at verða nýttur til sjálvsrannsókn. Ein spurningur er, um tað er neyðugt, og um tað ber til at fáa spælarastyrk aðra staðni frá. Ein annar spurningur er, um venjingarstøðan hevur verið nóg góð, og hvat skal gerast fyri at betra um hana.

Í dag verður lutur kastaður um, hvør skal spæla ímóti hvørjum í fyrstu innleiðandi umførunum í Europa Cup kappingunum. Umboð fyri HB, B36 og B68 eru í Sveis. Higartil hevur tað ikki hilnast nakað serligt hjá føroyskum feløgum, tá ið tey hava roynt seg í Europa. Á middegi í dag fæst fyrsta ábendingin, um tað verða betri vánir fyri tí hesa ferð. Hvør skal verða umboðaður í Sveis um eitt ár verður ikki greitt fyrrenn eftir Mikkjalsmessu. Men eftir 9. umfarið verður lættari at meta um, um nú skálamenn og NSÍ fara at hava møguleika at geva HB ein skarpan gang í FM kappingini.

EM-endaspælið í fótbólti

Bólkur A	d	v	j	t	mál	mál	+/-	stig
1 Portugal	3	2	0	1	4	2	2	6
2 Grikkaland	3	1	1	1	4	4	0	4
3 Spania	3	1	1	1	2	2	0	4
4 Russland	3	1	0	2	2	4	-2	3

Bólkur B	d	v	j	t	mál	mál	+/-	stig
1 Frakland	3	2	1	0	7	4	3	7
2 Ongland	3	2	0	1	8	4	4	6
3 Kroatia	3	0	2	1	4	6	-2	2
4 Sveis	3	0	1	2	1	6	-5	1

Bólkur C	d	v	j	t	mál	mál	+/-	stig
1 Svoríki	3	1	2	0	8	3	5	5
2 Danmark	3	1	2	0	4	2	2	5
3 Italia	3	1	2	0	3	2	1	5
4 Bulgaria	3	0	0	3	1	9	-8	0

Bólkur D	d	v	j	t	mál	mál	+/-	stig
1 Kekkia	3	3	0	0	7	4	3	9
2 Holland	3	1	1	1	6	4	2	4
3 Týskland	3	0	2	1	2	3	-1	2
4 Letland	3	0	1	2	1	5	-4	1

Brúktu teirra vápn

NSÍ venjarin, Jógvan Martin Olsen helt seg ikki kunna annað enn vera stak væl nøgdan við tað, sum hansara menn høvdu útinnt ímóti Skála.

- Vit høvdu ætlað at nýtt teirra vápn við at trýsta teir langt frammí á vøllinum, og tað eydnaðist væl. Fyri gongdina í 2. hálvleiki var tað sera týdningarmikið, at vit fingu mál dygst undan steðginum. Harvið kundu vit flyta okkum eitt vet aftur í 2. hálvleiki og bíða eftir møguleikanum at fara í kontraálop, sigur NSÍ venjarin.

NSÍ hevur nógv á skránni. Teir spældu í Esbjerg leygardagin, og mikukvøldið skulu teir til Havnar at spæla ímóti HB. Um teir aftur ta ferðina fara at megna at fáa fulla úrtøku, so fara teir at halda frí heilt frammí í toppinum.

- Higartil hevur tað gingið væl, hóast nógv er á skránni. Men tað verður ivaleyst tungt, tá ið vit annan sunnudag skulu til Fuglafirðar at spæla hálvfinalu. Tað ræður um at dosera venjingina rætt, so spælararnir fáa høvi at endurvinna styrkina ímillum stóru uppgávurnar, ásannar væl nøgdi NSÍ venjarin. *jh*

KÍ setti Esbjerg upp á pláss

Klaksvíkingar vunnu uppiborið 2-0, tá ið bronsuvinnararnir úr superliguni vitjaðu í Klaksvík mikukvøldið

KÍ vísti NSÍ vegin, tá ið klaksvíkingar mikukvøldið spældu føðingardagsdyst ímóti Esbjerg. Danska liðið skal leygardagin spæla seinna Intertoto Cup dystin ímóti NSÍ, og tá er kravið til NSÍ ein 2-0 sigur, ætlar liðið sær víðari. Og 2-0 var júst tað, sum KÍ kláraði at vinna á Esbjerg mikukvøldið.

Esbjerg byrjaði dystin við skjótum og ágangandi spæli, men KÍ-verjan stóð stinn. So hvørt sum dysturin leið, kom KÍ alt meira upp í part, og í løtum í seinna hálvleiki, vóru tað vertirnir, sum høvdu yvirvág.

Fyrra málið hjá KÍ kom eftir hornaspark í fyrra hálvleiki, sum Ove Nysted stútaði í málið. Og beint fyri leiklok økti innskifti Frank Joensen til 2-0 eftir eitt sera gott álop.

Ferðalagið úr Esbjerg býr á Viðareiði, og teir venja í Norðoyggjum undan dystinum móti NSÍ leygardagin.

-sportal.fo

Auf wiedersehn Týskland

Týski landsliðsvenjarin slær uppgevandi út við ørmunum. Nú hevur Rudi Vøller, sambært týska blaðnum Bild, eisini lagt frá sær sum landsliðsvenjari. Aftanfyri sæst Oliver Kahn takka týsku áskoðarunum fyri stuðulin

Týska landsliðið noyddist at lúta fyri eykaliðnum hjá bólkavinnaranum Kekkia, og tí tryggjaði Holland sær luttøku í fjórðingsfinaluni við at vinna 3-0 Letland

BÓLKUR D
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Sum einasta liðnum í EM-endaspælinum eydnaðist tað Kekkia at fáa fulla úrtøku burturúr bólkaspælinum. Kekkar vunnu allar sínar dystir, hóast teir í seinasta dystinum ímóti Týskland fóru á vøllin við einum eykaliði, har bert tveir av vanligu manningini vóru við, tí teir longu høvdu tryggjað sær víðari luttøku í kappingini.

Einki bit í týska álopinum

Sum væntað var tað Týskland, ið var við yvirvág ein stóran part av dystinum, men enn einaferð bleiv staðfest, at týsku fótbóltsrisarnir hava ein stóran trupulleika í álopspartinum, har Týskland í langa tíð ikki hevur havt ein veruligan málskorara. Kevin Kuranyi og Fredi Bobic eru góðir spælarar, men teir hava ikki sama støði, sum eitt nú Jürgen Klinsmann og landsliðsvenjarin sjálvur, Rudi Vøller, høvdu, tá ið teir báðir myndaðu álopið hjá Týsklandi fyrst í nítiárunum.

Tað hevur eisini víst seg, at nógv tey flestu málini hjá týska landsliðnum seinnu árini eru skotin av miðvallarleikarum, og tá ið Týskland fekk sett hol á mikukvøldið, var tað enn einaferð ein miðvallari, ið syrgdi fyri málinum. Einir 20 minuttir vóru leiktir av fyrra hálvleiki, tá ið Michael Ballack fekk bóltin áraka brotsteigarmarkið, og hann gjørdi ikki mætari enn at langa til við vinstra beini, og bólturin fleyg upp undir nettakið, og so var 1-0.

Kekkisku eykamenninir royndu at svara aftur, og tá ið hálvur tími var leiktur av fyrra hálvleiki, fingu teir javnað. Eitt fríspark var dømt til Kekkia væl uttan fyri týska brotsteigin og nakað úti í høgru síðu, og Marek Heinz gjørdi ikki mætari enn at langa bóltin upp í nærmasta málhorn, uttan at Oliver Kahn hevði nakran sum helst møguleika at verja fyri. Hetta málið kom dátt við týskarum, sum nú als ikki fingu spælið hjá sær at koyra, og hugflogið á týska miðvøllinum var ógvuliga avmarkað.

Baros sløkti týsku vónirnar

Seinni hálvleikur var ógvuliga tamur. Týskland royndi at koma longur fram á vøllin, men tað gekk ógvuliga striltið at koma til veruligar málmøguleikar. Tó var Michael Ballack nær við, men royndin hjá honum fór á stongina. Og tá ið tað so smátt var farið at líkjast einum veruligum týskum trýsti á kekkiska málið, fekk Kekkia eitt skjótálop, sum avgjørdi dystin. Innskifti Milan Baros úr Liverpool FC rann inn í týska brotsteigin, og hóast Oliver Kahn bjargaði í fyrstu atløgu, eydnaðist tað Baros at skora í aðru syftu. Hetta málið kom, tá ið okkurt um eitt korter var eftir at leika, og tað sást týðuligani, at týsku leikararnir mistu vónina eftir hetta mál.

Holland vann væntaða sigurin

Hin dysturin í bólkinum var millum Holland og Letland. Hóast Letland hevði staðið seg øgiliga væl í teimum báðum fyrstu dystunum í bólkinum, vóru hollendingar stórfavorittar undan hesum dystinum, og tað heiti livdu teir appelsinlittu eisini upp til.

Ruud van Nistelrooy legði Holland á odda 1-0, tá ið 25 minuttir við einum ivasomum brotssparki, sum danski dómarin Kim Milton Nielsen dømdi, tá ið Edgar Davids fór um koll áraka brotsteigarmarkið. Eina løtu seinni var vandamikli Manchester United-framherjin aftur á blettinum, tá ið Philip Cocu skallaði ein frísparksbólt inn í lettiska málteigin, har van Nistelrooy setti pannuna á, og so var 2-0. Hendan støðan helt sær leingi, men nakrar minuttir fyri leiklok staðfesti ein annar vandamikil hollendskur áleypari, Roy Makaay, sigurin, tá ið hann skeyt eitt gott skot eftir jørð í mál eftir gott uppspæl frá Arjen Robben.

Vøller takkar fyri seg

Eftir at hollendsku leikarar frættu úrslitið av dystinum millum Kekkia og Týskland, var gleðin, sum vera man, stór á teimum. Tey flestu høvdu væntað, at týskarar fóru at vinna á eykaliðnum hjá Kekkia, men so var ikki. Hollendska landsliðið tykist verða við at koma fyri seg í kappingini, og lítið er at ivast í, at hollendingar hava góðar vónir undan fjórðingsfinaluni ímóti svium.

Hósdagin visti týska blaðið Bild at siga, at týski landsliðsvenjarin, Rudi Vøller, hevði lagt frá sær. Hann hevur verið fyri nógvum atfinningum í týsku miðlunum, og millum annað verður spurnartekin sett við, hví hann fyri tað mesta bert leikar við einum einsamallum áleypara, tá ið farast skal á vøllin fyri at vinna dystir.

Yvirlit yvir fjórðingsfinalurnar

24.06.04	Kl. 19.45	Portugal-Ongland
25.06.04	Kl. 19.45	Frakland-Grikkaland
26.06.04	Kl. 19.45	Svoríki-Holland
27.06.04	Kl. 19.45	Kekkia-Danmark

Best í Beach Volley

Juanna S. Joensen vann fyri tveimum vikum síðani gull- og silvurmerki í opnari kapping í Beach Volley

Tað er eftirhondini gerandiskostur, at føroyskir flogbóltsleikarar gera um seg í Danmark.

Ein av teimum, sum skjótt hevur nógv ár á baki í donskum flogbólti er Juanna S. Joensen, og fyri tveimum vikum síðani fekk hon enn eitt heiti at erpa sær við.

Í kappingini, Århus Open, sum er kapping í beach volley, eydnaðist nevnliga Juannu at vinna tvey heiðursmerki.

Í A-røðini fyri kvinnur eydnaðist Juannu og makkara hennara, Evu Ostenfeld, at vinna røðina, og eisini í mix-kappingini eydnaðist at spæla seg fram til finaluna. Her máttu Juanna og makkarin, Morten Madsen, tó taka til takkar við silvurmerkinum.

-jm

Vøller gevur skarvin yvir

Týskland reyk í mikukvøldið út úr EM-kappingini í Portugal, og sambært størsta blaðnum í Týsklandi, Bild, fer landsliðsvenjarin Rudi Vøller at leggja frá sær. Vøller hevði annars sagt, at hann vildi halda fram sum landsliðsvenjari, men Bild heldur, at eftir tapið ímóti eykaliðnum hjá Kekkia, fer Vøller at tveita handklæði í ringin. Stóra stjørnan á týska liðnum, Michael Ballack, helt eftir dystin, at Týskland hevði gjørt tað, sum liðið megnaði.

– Stóri trupulleikin hjá okkum er, at vit gera ikki nóg nógv mál. Vit gjørdu okkara besta í dag, men í løtuni er tað bara ikki nóg mikið, segði Ballack eftir tapið á Kekkia.

-ek

Hollendingar góðar vónir

Kekkia og Holland komu víðari frá bólki D, og í fjórðingsfinalunum skal Kekkia spæla ímóti Danmark og Holland ímóti Svoríki.

Hollendski landsliðsvenjarin Dick Advocaat var í góðum hýri eftir 3-0 sigurin á Letlandi í mikukvøldið.

– Vit spældu disiplinerað í fýrra hálvleiki, og teir fingu bara ein hálvan kjans. Vit vistu, at um vit góvu teimum pláss, so kundu teir gerast vandamiklir, segði landsliðsvenjarin, sum hevði góðar vónir til fjórðingsfinaluna.

– Nú skulu vit spæla ímóti Svoríki. Tað er eitt lið, sum vit vita alt um, og sum vit eiga at vinna á, segði Advocaat.

-ek

Trapattoni finnist at stjørnunum

Italski landsliðsvernjarin Giovanni Trapattoni hevur ilt við at skilja, at hansara lið ikki longur er við í EM-kappingini.

– Eg hevði væntað mær meira av Totti, Del Piero og Vieri, men fyri at vera púra erligur, so ber tað ikki til at geva teimum alla skyldina, sigur Trapattoni.

– Del Piero kundi havt fingið meira burtur úr við røttu hjálpini. Totti hann sveik okkum og ger neyvan slíkt aftur, og Vieri vildi sleppa at spæla, hóast hann var skaddur í knænum, sigur Trapattoni, sum heldur, at eydnan var ikki við italska liðnum.

Sáttmálin hjá Trapattoni við italska fótbóltssambandið gongur út í juli, og hann ætlar sær ikki at leingja sáttmálan.

-ek

Morten Olsen onga feriu í Italia

Morten Olsen var langt síðani vorðin troyttur av italsku ákærunum um avtalað spæl millum Danmark og Svoríki, tá ið fjølmiðlafólk hittu hann á máli mikudagin.

– Teir hava ein øðrvísi hugsunarhátt, enn vit hava, so vit mugu seta eitt mark. Men eg skal ikki í feriu í Italia í ár, so tað kann kanska vera líkamikið, segði Morten Olsen.

Hann helt, at danir mistu bóltin ov lætt í dystinum ímóti Svoríki, og fleiri spælarar spældu ikki upp til sítt besta. Men hann hevur tó framvegis vónir um, at Danmark kann koma langt í kappingini.

-ek

Henke til Barca

Sambært spanska blaðnum El Mundo fer svenski landsliðsspælarin Henrik Larsson at spæla fyri Barcelona eftir summarsteðgin.

Blaðið skrivar, at nú manglar bara undirskriftin hjá Henrik Larson á sáttmálanum við Barcelona, men Henke vil ikki skriva undir nakran sáttmála, fyrr enn svenska liðið hevur spælt seg liðugt í EM-kappingini í Portugal.

-ek